# Litríkt, sveittut og fnisut

**KVINNURENNING** Leygardagin var á øðrum sinni skipað fyri kvinnurenning. Tað er blaðið Kvinna saman við ítróttarfelagnum Bragdinum, ið stendur fyri átakinum









Inna Tørnroos

*Mynd: Kristian Tørnroos*

Hesaferð vóru heilar 2.033 kvinnur meldaðar til, men 1.552 komu til start leygardagin klokan 16.

Annleyg Lamhauge, blaðstjóri á Kvinnu, bjóðaði vælkomin, og síðani var upphiting á skránni. Sjónvarpsverturin Sigrún Brend var frálík frásøgukvinna og minti kvinnurnar á at klípa eyka, meðan bíðað varð, eftirsum tað var á pápadegnum renningin var ...

Stutt eftir klokkan 16 byrjaðu 1.348 kvinnur upp á 5 km teinin, og løtu seinni fóru 204 kvinnur og barnavognar í holt við 2,5 teinin.

Runnið var frá Tórsbreyt oman til tyrlupallin - síðani til Studentaskúlan, framvið Plantusøluni, Svartafossi og upp aftur á Tórsbreyt.

Kvinnurenningin er ongin rættilig kapping, men eitt tiltak, har allar kvinnur kunnu vera við óansæð, hvussu formurin er.

Tær, sum komu fyrst á mál vóru tó í góðum formi. Tað var rennarin Bjørk Herup Olsen, sum rann teir 5 kilometrarnar upp á 19.24 minuttir. Nummar tvey og trý gjørdust Árna Helmsdal við tíðini 22.31 og Ann Thomsen við tíðini 22.54.

*inna@sosialurin.fo*










S&S



## DANSIBANDSTÚRUR

við Norrönu vikuskiftið 18.-20. juni

Frá 18. - 20. juni skipar Smyril Line fyri einum stórum dansibandstúri við Norrønu. Talan er um eitt nýtt og spennandi tiltak, har nógv áhugavert verður á skránni. Á túrinum verða millum annað Elis Poulsen og Erik Johansen frá bólkinum Scandinavia.

**Í spurnarkappingini S&S burturluta vit 2 ferðir til dansibandstúrin.**



SMYRIL LINE

SPURNARKAPPING
MIKUDAG KL. 15.15

## Skráin hjá Rás2

### Mánadagur 7. juni

15:00 Tíðindi
15:15 Ferðaradio – Sent verður úr kunningarstovuni í Runavík. Mirjam, og Heri leggja til rættis.
16:00 Tíðindi
16:05 Ferðaradio
17:45 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
22:00 Halleluja – Heine Lútzen og Andrew Djurhuus
00:00 Liðugt

### Týsdagur 8. juni

07:00 Tónleikur
09:00 Morgunsending – Johan í Kollafirði og Eyðfinn Drewsen eru vertir.
11:00 Tíðindi
11:15 Morgunsending
12:00 Tíðindi
12:15 Tónleikur
13:00 Ynskiløtan
14:00 Lysingar
14:10 Ynskiløtan
15:00 Tíðindi
15:10 Seinnapartur í Klaksvík – Barbara og Mirjam eru vertir.
16:00 Tíðindi
16:05 Seinnapartur í Klaksvík
17:00 Tíðindi
17:20 Fótbóltur
18:45 Tónleikur
21:00 Á Torgunum
22:30 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Mikudagur 9. juni

07:00 Tónleikur
09:00 Morgunsending
11:00 Tíðindi
11:15 Morgunsending – Eyðun Klakstein og Mirjam Pætursdóttir eru vertir
12:00 Tíðindi
12:15 Tónleikur
13:00 Ynskiløtan
15:00 Tíðindi
15:15 S&S – Spurnarkapping.
16:00 Tíðindi
16:05 Tónleikur
17:00 Tíðindi
17:20 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
00:00 Liðugt

FÓTBÓLTUR
TÝSDAGIN KL. 17.20



Løgmaður handar Víkingi løgmanssteypið

## Fótbóltur

Rás2 sendir beinleiðis frá seinnu hálvfinaluni í Gøtu millum Víking og ÍF. Byrjað verður at senda longu kl. 17.20, eftir tíðindini, við áhugaverdum práti og upptakt. Sjálvur dysturin byrjar kl. 18.30.

RÁS 2 ...títt radio